LÆR TEG

AT LESA UPP OG UNDIRVÍSA

th-FR
181114



LÆR TEG AT LESA UPP OG UNDIRVÍSA

– 1. TIMOTEUSARBRÆV 4:13

NAVN _____

SAMKOMA _____

Henda útgávan er ikki til sølu. Hon er framleidd sum liður í einum heimsumfatandi bíbliuundirvísingararbeiði, ið verður fíggjað við sjálvbodnum stuðli. Far inn á www.jw.org, um tú vilt lata stuðul.

Stendur einki annað viðmerkt, eru bíbliuorðini eftir umseting Victor Danielsens, endurskoðaðu útgávuni 1974. © Hin Føroyski Bíbliugrunnurin.

Apply Yourself to Reading and Teaching
Prentað í november 2018
Faroese (*th*-FR)
© 2018
Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania
Útgevarar:
Jehova vitni

INNIHALD

VENJING	
	Eitt bræv frá stýrandi ráðnum
1	Byrja væl
2	Tosa natúrligt
3	Brúka spurningar
4	Legg upp til bíbliuørindi
5	Rættur upplestur
6	Ger greitt, hví eitt bíbliuørindi verður brúkt
7	Neyvar og sannførandi upplýsingar
8	Brúka myndir í undirvísingini
9	Brúka visuelt tilfar
10	Variera røddina
11	Ver eldhugaður
12	Ver inniligur og vís samkenslu
13	Ger greitt, hvussu upplýsingarnar kunnu brúkast
14	Legg dent á høvuðspunktini
15	Ver sannførandi
16	Ver uppbyggjandi og positivur
17	Ger tað lætt at skilja
18	Ger tað upplýsandi og læruríkt
19	Nem hjartað
20	Enda væl

Eitt bræv frá stýrandi ráðnum

„Verið lærarar.“ (Hebr. 5:12) At hugsa sær! Jehova, besti lærarin í alheiminum, biður *okkum* læra onnur um hann! At læra onnur sannleikan um Jehova, antin tað er í familjuni, í samkomuni ella í boðanini, er ein dýrabarur framíhjárættur og ein stór ábyrgd. Hvussu klára vit tað?

Svarið er at finna í tí, sum Paulus skrivaði til Timoteus: „Ver íðin í upplestrinum, áminningini, læruni.“ Hann legði aftrat: „Táið tú tað gert, skalt tú frelsa bæði teg sjálvan og tey, sum hoyra teg.“ (1. Tim. 4:13, 16) Tú hevur ein lívbjargandi boðskap at bera øðrum. Tí er tað umráðandi, at tú alla tíðina roynir at betra tín upplestur og tína undirvísing. Hetta heftið kann hjálpa tær. Her eru nøkur dømi um, hvussu tað er bygt upp:

Á hvørjari síðu er ein tilvísing til eitt bíbliuørindi, sum vísir á eina bíbilska meginreglu ella eitt dømi, ið hevur samband við venjingina.

Praktisk ráð um, hvussu ymisk høvuðspunkt kunnu brúkast.

Í BOÐANINI: Uppskot, sum serliga kunnu brúkast í boðanini. Tey flestu av hinum uppskotunum í heftinum kunnu brúkast bæði í boðanini, og tá ið vit undirvísa frá pallinum.

Eingin lærari er sum Jehova. (Job 36:22) Hóast heftið kann hjálpa tær at betra tín upplestur og tína undirvísing, mást tú ongantíð gloyma, at boðskapurin kemur frá Jehova, og at tað er hann, sum dregur fólk til sín. (Jóh. 6:44) Tí mást tú ofta biðja um heilagan anda og brúka Bíblíuna dúgliga. Vís altíð á, hvat Jehova hugsar, ikki hvat tú sjálvur heldur. Royn at fáa tey, tú undirvísir, at elska Jehova av hjarta.

At tú sleppur at undirvísa í tí mest týðandi boðskapinum, sum nakrantíð er givin menniskjum, er ein stórur framíhjárættur. Vit eru vísir í, at tað fer at eydnast tær at undirvísa væl, um tú lítur á ’kraftina, sum Gud gevur’. – 1. Pæt. 4:11.

Felagar tínir í tænastuni

Stýrandi ráðið hjá Jehova vitnum

1 Byrja væl

Ápostlasøgan 17:22

Í STUTTUM: Tað fyrsta, tú sigur, má vekja áhuga, vísa á evnið og vísa, hví evnið eigur at hava týdning hjá teimum, sum lurta.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Vek áhuga.** Vel ein spurning, eina uppliving, onkur tíðindi ella okkurt annað forvitnisligt, sum tey, ið lurta, hava áhuga fyri.

Hugsa frammanundan um, hvat fólk hava áhuga fyri ella stúra fyri, og laga so tað fyrsta, tú vilt siga, eftir tí.

- **Vís á evnið.** Tryggja tær, at tað fyrsta, tú sigur, ger tað greitt hjá teimum, sum lurta, hvat evnið er, og hvat endamálið er við fyrilestrinum ella samrøðuni.

- **Vís, hví evnið hevur týdning.** Laga tað, tú sigur, eftir teimum, sum lurta. Tey mugu skilja, hvussu evnið kann hjálpa teimum persónliga.

Tá ið tú skalt gera ein fyrilestur, kanst tú spyrja teg sjálvan: 'Hvat er viðkomandi hjá brøðrunum og systrunum í mínari samkomu?' Ger so inngangin við tí í huga.

Í BOÐANINI: Fyri at vita, hvat fólk hava áhuga fyri, mást tú leggja merki til, hvat tey eru í holt við, hvat tú sært uttan fyri húsini, um tey hava børn og so framvegis. Tú kanst byrja samrøðuna við at seta ein spurning ella bara siga okkurt um tað, sum tú hevur lagt merki til.

Tosa natúrligt

2

Í STUTTUM: Tosa, sum tú vanliga tosar, og lat tað koma frá hjartanum.

Lukas 6:45a

HVUSSU GERT TÚ?

- **Fyrireika teg væl.** Bið Jehova hjálpa tær at hugsa um boðskapin, ikki um teg sjálvan. Hav greitt í huga, hvat tú í høvuðsheitum ætlar tær at siga. Ber tankar fram við egnum orðum, heldur enn bara at endurgeva ein tekst orð fyri orð.

Um tú ætlar tær at lesa eitt petti upp úr Bíbliuni ella onkrum øðrum lesnaði, mást tú seta teg væl inn í tað, so tú kanst lesa tað flótandi. Eru sitat í tekstinum, mást tú lesa tað, sum persónarnir siga, við innliving, tó uttan at gera ov nógv av.

- **Lat tað koma frá hjartanum.** Hugsa um tey, sum lurta. Minn teg á, hví tey hava brúk fyri at hoyra boðskapin. Tá sæst tað á tínum kropsburði, handakeipum og andlitsbrái, at tú meinar tað, sum tú sigur, og vilt teimum tað besta.

At vera natúrligur vil ikki siga, at tú skalt vera alt ov avslappaður. Vís boðskapinum virðing við at tosa týðiliga og málsliga rætt.

- **Hygg at teimum, sum lurta.** Tað er gott at hava eygnasamband við tey, sum lurta. Tá ið tú heldur ein fyrilestur, riggar tað væl at hyggja at einum persóni í senn, heldur enn bara at lata eyguni reika yvir allan salin.

3 Brúka spurningar

Matteus 16:13-16

Í STUTTUM: Set góðar spurningar fyri at gera tey, sum lurta, forvitin, fyri at fáa tey at hugsa nærri um eitt evni og fyri at leggja dent á týðandi tankar.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Gev teimum, sum lurta, hug at læra meira.** Set spurningar, sum gera fólk forvitin og fáa tey at hugsa.

- **Fá tey, sum lurta, at hugsa nærri um eitt evni.** Set eina røð av spurningum, sum hjálpa teimum, ið lurta, at koma til eina skilagóða niðurstøðu.

- **Legg dent á týðandi tankar.** Set ein forvitnisligan spurning, sum leggur upp til ein høvuðstanka. Brúka spurningar til at taka samanum, tá ið tú hevur viðgjørt ein týðandi tanka, ella tá ið tú endar fyrilesturin ella samrøðuna.

Tá ið tú hevur lisið eitt bibliuørindi, kanst tú við spurningum leggja dent á høvuðstankan.

Í BOÐANINI: Spyr tann vitjaða, hvat hann heldur um eitt evni. Lurta væl eftir svarinum. Brúka vit og skil, tá ið tú skalt gera av, hvørjar spurningar tú kanst seta, og nær tú kanst seta teir, so viðkomandi ikki verður illa við.

Legg upp til bibliuørindi

4

Í STUTTUM: Vek áhuga fyri einum bibliuørindi, áðrenn tú lesur tað.

Matteus 22:41-45

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hav í huga, hví tú lesur bibliuørindið.** Legg upp til hvørt ørindi, so tað er lætt at síggja tankan, tú vilt hava fram.

Hugsa um samanhangið. Sigur tú, hvør tað er, sum tosar ella hevur skrivað bibliubókina, mást tú tryggja tær, at tað, sum tú sigur, er rætt.

- **Brúka altíð Bibliuna í undirvísingini.** Tá ið tú tosar við fólk, sum trúgva á Gud, er tað gott at vísa til Bibliuna sum Guds orð. Soleiðis vísir tú, at tað, sum tú lærir tey, kemur frá Gudi.

- **Vek áhuga fyri bibliuørindinum.** Set ein spurning, sum bibliuørindið svarar, nevn ein trupulleika, sum tað kann hjálpa við at loysa, ella nevn eina meginreglu, sum ein bíbilsk frásøga kann hjálpa teimum at skilja.

Hugsa um, hvat fólk longu vita um evnið og bibliuørindið. Sjálvt um tú ætlar tær at lesa eitt kent ørindi, mást tú leggja væl upp til tað og hjálpa teimum, sum lurta, at síggja tað við nýggjum eygum.

5 Rættur upplestur

1. Timoteusarbræv 4:13

Í STUTTUM: Les akkurát tað, sum stendur.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Fyrireika teg væl.** Hugsa um, hví teksturin er skrivaður. Øva teg at lesa bólkar av orðum, heldur enn at lesa eitt orð í senn. Ansa eftir, at tú ikki leggur orð aftrat, loypur nakað um ella skiftir nøkur orð út. Hav teknsetingina í huga, eitt nú komma, punktum og spurnartekn.

Lat ein vin lurta eftir tær, meðan tú lesur, og bið hann siga frá, tá ið tú lesur skeivt.

- **Úttala hvørt orð rætt.** Veitst tú ikki, hvussu eitt orð skal úttalast, kanst tú til dømis finna tað í eini orðabók ella biðja ein, sum dugir væl at lesa, hjálpa tær.

- **Les týðiliga.** Ger tær ómak at úttala orðini væl. Hetta gert tú best, um tú lyftir høvdið og letur munnin væl upp. Royn at fáa øll stavilsi við.

Ansa eftir, at úttalan ikki verður so neyv og nágreinilig, at tað ljóðar ónatúrligt.

Ger greitt, hví eitt bíbliuørindi verður brúkt

6

Jóhannes 10:33-36

Í STUTTUM: Heldur enn bara at lesa eitt bíbliuørindi og fara beinleiðis víðari til næsta tankan, mást tú tryggja tær, at tey, sum lurta, týðiliga síggja sambandið millum ørindið og tankan, tú vilt hava fram.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Legg dent á lyklaorðini.** Tá ið tú hevur lisið eitt bíbliuørindi, eigur tú at leggja dent á tey orðini, sum hava beinleiðis samband við tað, sum tú vilt hava fram. Tað kanst tú gera við at siga orðini umaftur ella seta ein spurning, sum fær fólk at leggja merki til lyklaorðini.

Greiðir tú frá einum bíbliuørindi við egnum orðum, mást tú tryggja tær, at fólk skilja, hvussu orðini í sjálvari Bíbliuni undirstrika tað, sum tú vilt hava fram.

- **Fá tankan fram.** Um tú velur at nevna eina ávísa orsøk til at lesa eitt bíbliuørindi, mást tú aftaná greiða frá, hvussu lyklaorðini í ørindinum stuðla upp undir ta orsøkina.

Hav Bíbliuna opna, meðan tú tosar um ørindið. Tá kunnu fólk lættari seta tað, sum tú sigur, í samband við tað, tú akkurát hevur lisið.

- **Ger tað einfalt.** Tosa ikki um óneyðugar smálutir, sum einki hava við høvuðstankan at gera. Hugsa um, hvat fólk longu vita, og ger síðani av, hvussu nógv er neyðugt at siga fyri at fáa tey at skilja, hví tú lesur eitt bíbliuørindi.

7 Neyvar og sannførandi upplýsingar

Lukas 1:3

Í STUTTUM: Brúka álítandi upplýsingar, tá ið tú skalt hjálpa teimum, sum lurta, at koma til røttu niðurstøðuna.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Brúka álítandi keldur.** Lat tað, sum tú sigur, vera grundað á Bibliuna. Les beinleiðis úr henni, tá ið tað ber til. Ætlar tú tær at vísa til vísindaligar upplýsingar, eina tíðindafrásøgn, eina uppliving ella okkurt annað, mást tú fyrst tryggja tær, at keldan er álítandi og dagførd.

- **Brúka keldur rætt.** Greið frá bibliuørindum í samsvari við samanhangið, boðskapin í Bibliuni sum heild og lesnaðin, sum „hin trúgvi og skilagóði tænarin“ hevur givið út. (Matteus 24:45) Vísir tú til verðsligar keldur, mást tú ikki broyta nakað í tekstinum ella brongla tað, sum var ætlanin hjá høvundinum.

> Ger ikki ov nógv av, tá ið tú nevnir upplýsingar og tøl. Ansa til dømis væl eftir, at „nøkur“ ikki verður til „flestøll“, at „í summum førum“ ikki verður til „altíð“, og at „møguliga“ ikki verður til „allarhelst“.

- **Hjálp teimum, sum lurta, at skilja upplýsingarnar.** Tá ið tú hevur lisið eitt bibliuørindi ella víst til nakrar upplýsingar, kanst tú hjálpa teimum, sum lurta, at gera sína egnu niðurstøðu við at seta teimum nakrar spurningar ella forklára tað, sum tú vilt hava fram.

> **Í BOÐANINI:** Tá ið tú fyrireikar teg til boðanina, er gott at hugsa um, hvørjar spurningar fólk møguliga seta, og hvussu tú kundi svarað teimum. Setur onkur tær ein spurning, sum tú ikki dugir at svara, kanst tú bjóða tær at kanna evnið og koma aftur ein annan dag.

Brúka myndir í undirvísingini

8

Matteus 13:34, 35

Í STUTTUM: Ger undirvísingina betri við einføldum myndum, sum tala til fólk og læra tey týðandi sannleikar.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Vel einfaldar myndir.** Ger sum Jesus, og lýs týðandi sannleikar við onkrum vanligum úr gerandisdegnum, og lýs okkurt torført við onkrum løttum. Nevn ikki óneyðug smáting, sum gera myndina fløkjasliga. Tryggja tær, at myndin, øll sum hon er, hóskar til tað, sum tú vilt hava fram í tíni undirvísing, so tey, sum lurta, ikki verða órógvað av onkrum, tey ikki skilja ella ikki fáa at passa saman.

Fá hugskot til nýggjar myndir við at hava eygu og oyru opin í gerandisdegnum, við at kanna okkara lesnað og við at lurta eftir teimum, sum duga væl at undirvísa. Skriva so tær myndirnar niður, sum tú vilt brúka í tínari undirvísing.

- **Hugsa um tey, sum lurta.** Vel myndir, sum hóska til tað, fólk fáast við og hava áhuga fyri. Ansa eftir, at myndirnar, tú velur, hvørki gera tey illa við ella firtin.

- **Fá høvuðstankan fram.** Góðar myndir lýsa høvuðstankarnar, ikki smálutirnar. Tryggja tær, at fólk ikki bara minnast myndina, men eisini lærdómin í henni.

9 Brúka visuelt tilfar

1. Mósebók 15:5

Í STUTTUM: Brúka visuelt tilfar, so týðandi tankar gerast greiðari og lættari at minnast.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Vel visuelt tilfar, sum ger tína undirvísing betri.** Brúka myndir, diagramm, kort, tíðarlinjur ella annað, sum undirstrikar *týðandi* tankar, ikki smálutir. Hjálp teimum, sum lurta, at minnast tað, sum tú vilt læra tey, og ikki bara visuella tilfarið.

- **Tryggja tær, at fólk síggja visuella tilfarið.**

Ger visuella tilfarið, sum tú ætlar tær at brúka, klárt í góðari tíð.

Í BOÐANINI: Vís tí vitjaða eina mynd í okkara lesnaði, og spyr hann, hvat hann fær burturúr. Um neyðugt, kanst tú seta eykaspurningar fyri at fáa týðandi tankar fram. Tá ið tú vísir ein film, mást tú tryggja tær, at tann vitjaði sær skermin væl. Vanliga er óneyðugt at tosa, meðan filmurin spælir.

Variera røddina

10

Í STUTTUM: Fá meiningina fram, og vek kenslur við at variera styrkina, tónaleguna og ferðina, tá ið tú tosar.

Matteus 20:31

HVUSSU GERT TÚ?

- **Variera styrkina.** Tosa harðari, tá ið tú vilt leggja dent á týðandi tankar og eggja teimum, sum lurta, til at gera nakað. Ger tað sama, tá ið tú skalt lesa ein dómsboðskap upp úr Bíbliuni. Ger røddina veikari, tá ið tú vilt skapa forvitni ella lýsa ótta ella stúran.

Tosa ikki so hart, at fólk føla, at tú skeldar. Ansa eftir, at tú ikki broytir røddina so nógv, at tað tekur alt uppmerksemið. Royn altíð at ljóða natúrligur.

- **Variera tónaleguna.** Tá ið tú vilt vísa eldhuga ella siga frá stødd ella frástøðu, kanst tú fara upp í tónalegu. Og tá ið tú vilt vísa sorg ella stúran, kanst tú fara niður í tónalegu.

- **Variera ferðina.** Tosa skjótari fyri at skapa spenning. Tosa seinni fyri at leggja dent á týðandi tankar.

Ansa eftir ikki at broyta ferðina so knappliga, at tey, sum lurta, hvøkka við. Tosa ikki so skjótt, at fólk ikki fáa fatur í tí, sum tú sigur.

11 Ver eldhugaður

Rómbrævið 12:11

Í STUTTUM: Tosa við eldhuga, so fólk fáa hug at fylgja tí, tey hoyra.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hav hjartað við.** Tá ið tú skalt fyrireika teg, mást tú hugsa gjølla um, hví evnið hevur týdning. Set teg so væl inn í tilfarið, at tað, sum tú sigur, kann koma frá hjartanum.

- **Hugsa um tey, sum skulu lurta.** Ger tær greitt, hvussu tað, sum tú skalt lesa upp ella læra onnur, kann gagna teimum. Og hugsa eisini um, hvussu tú kanst forklára upplýsingarnar, so fólk skilja, hvussu tey kunnu fáa nyttu av teimum.

- **Ger tað livandi.** Lat tað hoyrast, at tú ert eldhugaður. Vís tínar kenslur við natúrligum handakeipum og andlitsbrái.

Ansa eftir, at fólk ikki verða órógvað av, at tú í heilum brúkar tær somu handakeipurnar. Brúka handakeipur, sum hóska til tað, tú sigur. Ver eldhugaður, serliga tá ið tú tosar um høvuðstankar og roynir at fáa fólk at fylgja tí, tey hoyra. Ver ikki líka eldhugaður alla tíðina, tí tað verður troyttandi hjá teimum, sum lurta.

Ver inniligur og vís samkenslu

12

1. Tessalonikabrævv 2:7, 8

Í STUTTUM: Lat tað hoyrast á tær, at tú veruliga leggur í tey, sum lurta.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hugsa um tey, sum lurta.** Tað er lættari at vísa samkenslu, um tú frammanundan minnir teg á, hvørjar trupulleikar fólk hava at stríðast við. Royn at ímynda tær, hvussu tey hava tað.

- **Vel røttu orðini.** Royn at lívga, ugga og styrkja tey, sum lurta. Ansa eftir, at tú ikki brúkar orðingar, sum kunnu gera tey firtin. Sig einki negativt um fólk, sum ikki eru Jehova vitni, og heldur ikki um teirra trúgv.

- **Vís, at tú hevur áhuga.** Við blíðum tónalagi og hóskandi handakeipum kanst tú vísa teimum, sum lurta, at tú hevur áhuga fyri teimum. Lat tað síggjast á andlitsbránum, og smíl ofta.

Royn hvørki at tvinga kenslur fram ella at gera ov nógv av. Tá ið tú skalt lesa upp, er tað umráðandi at fáa kenslurnar fram í tekstinum, men ansa eftir, at fólk ikki hugsa meira um teg, enn um tað, sum verður lisið. Leggur tú ov nógva herðing á hjáljóðini, kann tað virka kalt og kubbut, og tí er betri at draga sjálvljóðini eitt sindur út, so tú ljóðar blíðari á málinum.

13 Ger greitt, hvussu upplýsingarnar kunnu brúkast

Esaias 48:17

Í STUTTUM: Hjálp teimum, sum lurta, at skilja, hví evnið er viðkomandi hjá teimum, og vís, hvussu tey kunnu brúka tað, tey læra.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hugsa um tey, sum lurta.** Hugsa um, hví fólk hava brúk fyri tí, sum tú hevur at siga, og hvat serliga kann hjálpa teimum.

- **Vís gjøgnum allan fyrilesturin, hvat tey, sum lurta, skulu gera.** Øll, sum lurta, skulu beinanvegin føla: 'Hetta er til mín.' Forklára, hvussu hvørt høvuðspunkt kann brúkast. Nevn ítøkilig dømi.

Vís kærleika og umhugsni, tá ið tú forklárar, hvussu meginreglur í Bibliuni kunnu brúkast. Heldur enn at geva øðrum ringa samvitsku, mást tú hjálpa teimum at fáa størri kærleika og trúgv. Lít á, at tey hava hug at gera tað rætta.

Í BOÐANINI: Tá ið tú fyrireikar teg til boðanina, er gott at hugsa um, hvat verður tosað um í tíðindunum, og hvat fólk í økinum hava áhuga fyri. Laga tað, sum tú sigur, eftir tí vitjaða. Set spurningar, sum geva viðkomandi hug at fortelja, hvat hann hevur áhuga fyri ella stúrir fyri. Lurta síðani eftir svarinum, og laga tað, sum tú vilt siga, eftir tí.

Legg dent á høvuðspunktini

14

Í STUTTUM: Ger tað lætt hjá teimum, sum lurta, at fylgja við, og vís, hvussu hvørt høvuðspunkt passar til heitið á fyrilestrinum og endamálið við honum.

Hebrearabrævið 8:1, Dahl/Viderø

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hugsa um endamálið við fyrilestrinum.** Finn út av, um endamálið er at upplýsa, sannføra ella tilstuðla tey, sum lurta, og hav so hetta í huga, meðan tú gert fyrilesturin. Tryggja tær, at øll høvuðspunktini hjálpa tær at røkka hesum málinum.

Spyr teg sjálvan: 'Hvørjir spurningar ella hvørjar atfinningar kunnu stinga seg upp í sambandi við evnið, og í hvørjari raðfylgju?' Ber síðani høvuðstankarnar fram í tí raðfylgjuni, so fólk fáa fylgt við og eru før fyri at skilja og góðtaka upplýsingarnar.

- **Legg dent á heitið.** Vís til heitið gjøgnum allan fyrilesturin. Tað kanst tú gera við at endurtaka lyklaorðini í heitinum ella brúka orð, sum minna um.

- **Lat høvuðspunktini vera greið og einføld.** Vel bara høvuðspunkt, sum hóska til heitið, og sum tú klárar at greiða væl frá í tíðini, sum er ásett til fyrilesturin. Hav ikki ov nógv høvuðspunkt við, og lat hvørt av teimum koma týðiliga fram. Steðga eitt sindur á millum høvuðspunktini, og lat skiftið frá einum høvuðspunkti til tað næsta virka natúrligt.

Tú kanst nevna høvuðspunktini fyrst í fyrilestrinum, so tað verður lættari at fylgja við, og tú kanst endurtaka tey, beint áðrenn tú endar fyrilesturin, so tað verður lættari at minnast tey.

15 Ver sannførandi

Ápostlasøgan 18:4

Í STUTTUM: Vís, at tú veruliga trýrt upp á tað, sum tú sigur, og at tað hevur týdning.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Fyrireika teg væl.** Kanna tilfarið so væl, at tú skilur, hvørjir høvuðstankarnir eru, og hvussu bíbliuørindini stuðla upp undir teir. Royn við fáum orðum at forklára høvuðstankarnar. Hugsa um, hvussu tilfarið kann gagna teimum, sum skulu lurta. Bið um heilagan anda.

Øva teg hart, so tú hevur tankarnar greitt í huga og kanst bera teir fram so væl, sum til ber.

- **Brúka orð, sum vísa, at tú ert sannførdur.** Tosa við egnum orðum, heldur enn at brúka akkurát tær orðingarnar, sum standa í lesnaðinum. Orða teg soleiðis, at eingin ivi er um, at tú veruliga trýrt upp á tað, sum tú sigur.

- **Vís, at tú meinar tað av hjarta.** Tosa nóg hart, og hav eygnasamband við tey, sum lurta.

Minst til, at tað at orða seg við sannføring ikki vil siga, at tú skalt vera ófólkaligur, sjálvklókur ella ágangandi. Ver altíð blíður á málinum, eisini tá ið tú vilt siga nakað, sum tú ert púra sannførdur um.

Ver uppbyggjandi og positivur

16

Efesusbrævið 4:29

Í STUTTUM: Legg dent á loysnir, ikki trupulleikar. Royn at styrkja tey, sum lurta.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hav eina positiva áskoðan á tey, sum lurta.** Lít á, at tínir trúarfelagar gjarna vilja gleða Jehova. Er tað neyðugt at vegleiða, mást tú fyrst rósa, um tað ber til.

Lat tað, sum tú sigur, bera dám av kærleika, ikki irritatión. At smíla hjartaliga kann fáa tey, sum lurta, at føla seg væl.

- **Legg ikki ov stóran dent á tað negativa.** Vís bara á nakað negativt í sambandi við eitt evni, um tað tænir einum endamáli. Sum heild skal tað, sum tú sigur, hava positivan dám.

- **Styrk onnur við Bibliuni.** Vís á, hvat Jehova longu hevur gjørt, ger beint nú og fer at gera fyri mannaættina. Royn at uppbyggja og styrkja tey, sum lurta.

Í BOÐANINI: Met øll, tú hittir, sum komandi trúarfelagar.

17 Ger tað lætt at skilja

1. Korintbræv 14:9

Í STUTTUM: Hjálp teimum, sum lurta, at skilja tað, sum tú tosar um.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Kanna tilfarið væl.** Tryggja tær, at tú skilur evnið so væl, at tú kanst greiða frá tí við egnum orðum og gera tað einfalt.

- **Brúka stuttar setningar og einfaldar orðingar.** Viðhvørt kann tað vera neyðugt at brúka longri setningar, men tá ið tú skalt forklára høvuðstankar, mást tú orða teg stutt og greitt.

> Nevn ikki óneyðugar smálutir, sum kunnu forvirra og troytta tey, sum lurta. Tosa vanligt, ikki háfloygt.

- **Forklára ókendar orðingar.** Royn at lata vera við at brúka orðingar, sum fólk ikki kenna. Noyðist tú at brúka eina ókenda orðing, mást tú forklára hana. Tað sama er galdandi, um tú skalt vísa til ein bíbilskan persón, eina mátieind ella ein sið, sum fólk ikki kenna so væl.

Ger tað upplýsandi og læruríkt

18

Í STUTTUM: Set gongd á tankarnar hjá teimum, sum lurta, og lat tey føla, at tey fáa nakað burturúr.

1. Korintbræv 9:19-23

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hugsa um, hvat fólk longu vita.** Hjálp teimum at síggja evnið úr einum øðrum sjónarhorni, heldur enn bara at endurtaka nakað, sum tey hava hoyrt fyrr.

Viðger væl kent tilfar eitt sindur skjótari, men set ferðina niður, tá ið tú sigur frá onkrum, sum ikki er so kent.

- **Kanna tilfarið og grunda um tað.** Tá ið tað ber til, kanst tú lýsa høvuðstankar við at nevna okkurt áhugavert, sum ikki er so kent, ella okkurt, sum er frammi í løtuni. Hugsa um tilfarið hjá tær, og hvat samband er millum tilfarið og tær upplýsingarnar, tú ætlar tær at nevna.

Tá ið tú kannar tilfarið, kanst tú seta ferð á tínar egnu tankar við at seta tær sjálvum spurningar sum *'hvør, hvar, hvat, hví, hvussu* og *nær'*. Tú kanst gera tína undirvísing meira livandi við at seta slíkar spurningar og svara teimum í fyrilestrinum.

- **Vís, hvussu evnið kann brúkast.** Greið frá, hvussu Bíblian kann brúkast í gerandisdegnum. Nevn ávísar støður, áskoðanir og gerðir, ið eru viðkomandi hjá teimum, sum lurta.

19 Nem hjartað

Orðtøkini 3:1

Í STUTTUM: Hjálp teimum, sum lurta, at virðismeta tað, tey læra, og at fylgja tí.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Hjálp teimum, sum lurta, at rannsaka seg sjálv.** Set spurningar, sum fáa tey at hugsa um, hvat tey sjálv halda um evnið.

- **Styrk hugin at gera tað rætta.** Eggja teimum, sum lurta, til at hugsa um, *hví* tey gera tað, sum er rætt. Hjálp teimum at gera tað við rætta motivinum, nevniliga tí tey elska Jehova, síni medmenniskju og tað, sum Bíblian lærir. Royn at hjálpa teimum at síggja, hví tað, sum Bíblian sigur, er skilagott. Ansa eftir ikki at kritisera. Tá ið fyrilesturin er av, skulu tey ikki sita eftir við ringari samvitsku, men føla seg væl og hava hug at gera sítt besta.

- **Gev Jehova æruna.** Legg dent á, hvussu læran, meginreglurnar og boðini í Bíblíuni endurspegla teir eginleikarnar, Jehova hevur, og hansara kærleika til okkara. Royn at fáa tey, sum lurta, at hugsa um, hvat Jehova dámar og ikki dámar, og gev teimum hug at gleða hann.

Minst til, at tað er *Jehova,* sum dregur menniskju. Brúka hansara orð til at motivera tey, sum lurta.

Í BOÐANINI: Tá ið tað ber til, kanst tú við at seta spurningar finna út av, hvat tann vitjaði heldur um ymiskt. Legg merki til, hvat andlitsbráið og tónalagið sigur um, hvat hann hugsar. Men ver tolin. Tað kann taka tíð, áðrenn fólk hava hug at siga, hvat tey meina innast inni.

Enda væl

20

Prædikarin 12:13, 14

Í STUTTUM: Enda við at eggja teimum, sum lurta, til at taka tað, sum tey hava hoyrt, til sín og fylgja tí.

HVUSSU GERT TÚ?

- **Lat tað síðsta, tú sigur, hava samband við høvuðsevnið.** Nevn høvuðspunktini og heitið aftur.

- **Gev teimum, sum lurta, hug at gera nakað.** Hjálp teimum at skilja, hvat tey skulu gera, og gev teimum góðar grundir til at gera tað. Lat tað hoyrast, at tú veruliga trýrt tí, sum tú sigur, og at tað hevur týdning.

- **Ger tað stutt og greitt.** Legg ikki nýggj høvuðspunkt fram. Enda við nøkrum fáum tilstuðlandi orðum.

Ger ikki ov skjótt av við tí síðsta, tú vilt siga. Lat heldur ikki røddina fjara burtur í einki. Sig teir síðstu setningarnar soleiðis, at tað hoyrist, at fyrilesturin er um at vera av.

Í BOÐANINI: Tá ið prátið er um at vera liðugt, kanst tú endurtaka tað, sum tú gjarna vilt hava tann vitjaða at minnast. Hendir tað, at samrøðan knappliga má steðga, mást tú royna at siga okkurt positivt at enda. Sjálvt tá ið onkur er ófólkaligur, mást tú svara soleiðis, at viðkomandi kanska fær hug at lurta eina aðru ferð.

TÍNI FRAMSTIG

		DAGFESTING				
1	Byrja væl					
2	Tosa natúrligt					
3	Brúka spurningar					
4	Legg upp til bíbliuørindi					
5	Rættur upplestur					
6	Ger greitt, hví eitt bíbliuørindi verður brúkt					
7	Neyvar og sannførandi upplýsingar					
8	Brúka myndir í undirvísingini					
9	Brúka visuelt tilfar					
10	Variera røddina					
11	Ver eldhugaður					
12	Ver inniligur og vís samkenslu					
13	Ger greitt, hvussu upplýsingarnar kunnu brúkast					
14	Legg dent á høvuðspunktini					
15	Ver sannførandi					
16	Ver uppbyggjandi og positivur					
17	Ger tað lætt at skilja					
18	Ger tað upplýsandi og læruríkt					
19	Nem hjartað					
20	Enda væl					